# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tapið ta ferðina er ein orsøk til, at eg ikki longur standi á odda fyri landsliðnum*

*Josef Hickersberger*

# Her eru teir – 18 ár seinni

**18 ár eru liðin síðani minniliga sigurin í Landskrona. Á føroyska fótbóltslandsliðnum er Jens Martin Knudsen, núverandi hjálparvenjari, einasta sambandið til teir 16, sum vóru á vøllinum ella á beinkinum í Landskrona. Hjá Eysturríki er Andreaz Herzog somuleiðis hjálparvenjari, og eisini hann er einasta sambindingin millum eysturríkska landsliðið í dag og so tað, sum mátti lúta í Landskrona**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hvar fóru teir, og hvat gera teir nú. Og hvør spældi við? Tað eru spurningar, sum fleiri helst seta sær, tá litið verður aftur á liðið, sum basti Eysturríki í Landskrona á sinni.

Tað sama ger seg galdandi í Eysturríki, har teir 16, sum vóru partur av eyðmýkjandi tapinum seint verða gloymdir.

Saman við Bartl Harald frá eysturríkska Nachrichten hava vit sett upp niðanfyristandandi yvirlit.

## Føroyska liðið

**Jens Martin Knudsen:**
Málverjin við topphúgvuni gjørdist heimskendur eftir síni brøgd í landskrona. Tá spældi hann við NSÍ, men fótbólturin tók hann síðani til GÍ í Gøtu, íslendska Leiftur – har hann eisini var venjari, skotska Ayr og aftur til barndómsfelagið í Runavík, har hann at enda var partur av fyrsta FM-heitinum hjá felagnum. Var eisini ein merkisverdur ítróttamaður, sum var føroyameistari í fimleiki og toppskjútti í hondbóltskappingini, har hann eisini var við á U21-landsliðnum. Er í dag hjálparvenjari á landsliðnum og framleiðslustjóri hjá Viking Seafood, umframt at hann arbeiðir fyri samtak, sum hevur til endamáls at byggja fótbóltshøll.

**Tummas Eli Hansen:**
Treiski verjuspælarin spældi øll árini við B36, og eftir seinasta dystin í 1997 kundi hann taka ímóti fyrsta FM-steypinum hjá felagnum í 35 ár. Síðani miðskeiðis í 90'unum hevur hann eisini rikið egið el-innleggjaravirki.

**Jóannes Jakobsen:**
Liðskiparin á heilin í verjuspælinum spældi fótbólt nøkur ár afturat. Tað er tó mest sum venjari og viðmerkjari, at hann hevur gjørt vart við seg síðani. Sum venjari hevur hann verið hjá VB, KÍ, HB, B68 og B36, har gullmerkið í HB í 2002 er størsti sigurin. Í borgarliga starvinum er hann lærari, umframt at hann í frítíðini er íðin tónleikari. Hevur eisini egið studio, har hann framleiðir fleiri útgávur fyri onnur.

**Mikkjal Danielsen:**
Maskinmeistarin úr Miðvági tók fullkomliga pippið frá Tony Polster, sum var størst eysturríkska stjørnan um hetta mundið. Mikkjal spældi ikki so nógvar dystir afturat á landsliðnum, tá hann taldist millum teir eldru á liðnum, og enn sum áður starvast hann sum maskinmaður í Miðvági.

**Julian Hansen:**
Høgri bakkurin spældi bert tann eina landsdystin afturat eftir Landskrona, tí eftir dystin í Parkini boðaði hann frá, at hann gavst á landsliðnum. Hann hevði tá búð í Danmark í nøkur ár, og tað ger hann framvegis. Fótbóltinum hevur hann tó ikki slept, og virkar hann í løtuni sum hjálparvenjari hjá FC Amager.

**Allan Mørkøre:**
Yngsti spælarin á Landskrona-liðnum taldist í drúgt áramál millum teir allar fremstu føroysku spælararnar. Umframt barndómsfelagið KÍ, hevur hann eisini



*Maskinmaðurin úr Miðvági pakkaði mega-stjørnuna úr Sevilla inn í 1990. Mikkjal Danielsen starvast framvegis í Miðvági. Tony Polster taldist í fleiri ár millum fremstu europisku málskjúttarnar, og í dag selur hann sín egna person til events av ymsum slag*



*Helst st*
*við 1-ta*